# Í fongsul fyri harðskap móti politinum

**Ein 21 ára gamal maður varð í Føroya rætti í gjár dømdur fimm mánaða fongsulsrevsing fyri at hava framt harðskap móti politinum, men tað taldi eisini við, at hann hevði ein treytaðan dóm fyri grovan harðskap, og royndartíðin var ikki úti enn**



*Her fór badagin fram*

Randi Jacobsen

Lítið var um ein 21 ára gamlan mann, sum hevur sitið varðhaldsfongslaður síðan 15. august, tá ið hann týsdagin kom fyri rættin.

Hann var ákærdur fyri í tveimum førum at hava framt harðskap móti politistum og fyri eina roynd at vera harðligur móti einum politisti.

Hann mintist einki frá hendingini.

Hann kundi bara fortelja, at hann á veg á stevnu hetta kvøldið hevði drukkið nógv og skjótt, og hann hevur upplivað tað áður, at tá ið hann ger tað, fær hann blackout.

Á stevnuni hevði hann møtti einum øðrum ungum manni, sum hann var illur inn á, tí hesin skyuldi hava gjørt seg inn á systur hansara.

Onkursvegna hevði tann ákærdi maðurin fingið skaða, og tá ið hann kom til Havnar, varð hann í sjúkrabili um náttina fluttur á skaðastovuna á Landssjúkrahúsinum.

Men hann hevði verið so fullur og ómøguligur, at starvsfólkini á skaðastovuni fingu ikki tikið sær av manninum. Í staðin ringdu portørarnir eftir politinum.

Tveir politistar fóru í politibili út á Landssjúkrahúsið, har teir fingu eyga á mannin, sum ikki vildi siga, hvør hann var.

### Ómøguligur

Politistarnir høvdu ætlað at koyrt mannin heim, men tá ið hann ikki búði í Havn, og hann var so fullur, hildu teir tað vera best at seta hann í detensjónina.

Eina løtu aftaná komu tveir politistar aftrat.

Meðan maðurin varð hildin niðri, og hondjørn vórðu løgd á hann, hevði hann sambært trimum av politistunum, spýtt á ein politist, og spýttið rakti politistin bæði á klæðini, á hálsin og í andlitið. Alt sá heldur ógvusligt út, tí maðurin var farin at bløða aftur undir handtøkuni, og blóð var í spýttinum.

Maðurin gjørdi stóra mótstøðu, tá ið tveir politistar stríddust við at fáa hann inn í politibilin, og mitt í øllum skallaði hann annan politistin í andlitið.

Teir báðir politistarnir hildu honum, meðan triði politisturin koyrdi.

Fjórði politisturin var inni á Landssjúkrahúsinum.

Tá ið so politibilurin við manninum og teimum trimum politistunum kom í politibilinum, og maðurin skuldi fáast út, royndi hann eina ferð enn at skalla ein politist, men tað eydnaðist ikki.

Maðurin segði í rættinum, at hóast hann ikki mintist hendingina, fekk hann seg ikki til at trúgva, at hann hevði spýtt, tí tað helt hann vera so niðurgerandi.

Allir fýra politistarnir vórðu førdir sum vitni.

### Tvífald revsing

Tað verður altíð dømt hart at vera harðlig móti politinum, men tað, sum gjørdi tað enn verri hjá hesum manninum var, at hann hevði ein treytaðan dóm fyri ráan harðskap hangandi. Royndartíðin var ikki úti.

Ákærin kravdi mannin at vera revsaðan við fongsli í hálvt ár, men tað helt verjin vera í meira lagi. Hon helt tað ikki vera vist, at maðurin hevði ætlað at rakt politistin, tá ið hann spýtti. Verjin bað eisini dómaran taka tað við í meting síni, at maðurin hevði góð persónlig viðurskifti. Arbeiðsgevarin bíðaði eftir honum, og verjin bað um treytaða revsing.

Men dómarin valdi at geva manninum finn mánaða treytaleysa fongsulsrevsing, og hann skal eisini gjalda sakarmálsútreiðslurnar.

Tann 21 ára gamli maðurin hevur sitið varðhaldsfongslaður í meira enn ein mánað, og tann tíðin verður drigin frá.

Ákærin bað um, at maðurin skuldi sita dómin beinanvegin, tí hon helt vanda vera fyri, at hann fer og ger okkurt líknandi aftur.

Men tí vísti verjin aftur. Hendingin í treytaða dóminum, sum maðurin hevði frammanundan, var heilt afturi í 2006, og síðan hevur einki verið.

### Vildi sleppa til arbeiðis

Hesin var dómarin samdur í og spurdi mannin, hvat hann helt,

Maðurin vildi sleppa leysur og sita dómin seinni. Hann vildi út at tosa við arbeiðsgevara sín, sum hevur bíðað eftir honum. Arbeiðsgevarin hevur eitt stórt arbeiði at gera fyri framman og hevur brúk fyri manninum. Um hann ikki slapp út nú, misti hann arbeiði, var hann bangin fyri.

Dómarin segði við mannin, at hann nú varð latin leysur. Og at hann hevði at lata vera við at fara út og drekka seg fullan og gera nakað býtt.

\- Nei, tað geri eg so avgjørt ikki, segði tann ungi maðurin.



## Carsten Vagn-Hansen á Hotel Føroyum

Seinastu árini hevur tað verið "inn" at verða sunnur. Fólk eru farin at renna, ganga og eta sunt. Í hesum sambandi hevur Bailine fingið danska læknan og heilsuráðgevan Carsten Vagn-Hansen til Føroya at halda fyrilestrar um í høvuðsheitum lívsstíl og lívsvirði.

Hann heldur tveir fyrilestrar á Hotel Føroyum ávikavist mánakvøldið 27. september og mikukvøldið 29. september um kost, sodning, tarmfunktión, typu 2 diabetes og natúrliga viðgerð, sang, heilsu og lívsgleði, krabbameinsfyribyrging og natúrliga viðgerð.

Umframt fyrilestarnar skipar Carsten Vagn-Hansen fyri skeiði fyri kvinnur og menn í hølunum hjá Bailine í Lucas Debesargøtu í Havn týsdagin 28. september. Evnini á skeiðnum eru til dømis heilsugóður kostur, mjólk, hvíttmjøl og sukur við atliti at vekttrupulleikum, gikt, sclerose, diabetes, fybromyalgi, sýru/basu, teimum við stoffskiftissjúku og teirra trupulleikum at lætna, og hví tað er so torført hjá summum at lætna.

Árið 2010 er rørsluár og 2011 er kostár, so at bæði árini eru í góðum samsvari við endamálinum hjá Bailine, og tað er at bøta um fólkaheilsuna, sigur Elinborg Johannesen, sum eigur og rekur Bailine-klinikkina í Havn.

Bailine er eitt internationalt system við vekt- og figurkontrolli fyri kvinnur.



## Anne Kristine Herje vitjar Frelsunarherin

Frelsunarherurin hevur vitjan av major Anne Kristine Herje, sum hevur verið trúboðari í meira enn 40 ár. Anne Kristine var bara 24 ára gomul, tá hon fór til eitt av teimun fátæku londinum í Miðameirka. Hon er soldátur í Frelsunarherinum og hevur gjørt tænastu í nøkrum av teimum ringastu krígsherjaðu londunum í heiminum.

Hon fær ikki løn frá militærinum, hóast hon hevur eitt arbeiði, ið er vandamiklari enn vit kunnu ímynda okkum, men hon arbeiðir í einum heri, ið trygt kann kallast heimsins friðarligasti herur, Frelsunarherurin. Hon berjist ikki við vápnum og tílíkum. Hennara vápn hevur altíð verið medmenniskjaligheit og vón, og tað er eitt av endamálunum hjá Frelsunarherinum.

Anna Kristina hevur altíð verið virkin við at hjálpa menniskjum ið hava tað trupult, antin tað er heima í Noregi ella í sínum arbeiði sum Harrans útrætti armur í nøkrum av heimsins fátækstu umráðum. Við sær í viðførinum hevur hon ikki altíð vælskrivaðar talur ella skjøl, men hon hevur vón til líðandi menniskju. Hon hevur aldri verið gift, men alíkavæl er hon móðir at mongum børnum.

Anne Kristine Herje verður á Heimaforbundinum hjá Frelsunarherinum hóskvøldið 23. september kl. 20.00, kollektin fer til arbeiði á Haiti. Hon kemur at tala á morgunmøtinum sunnudagin 26. september kl. 11 og á kvøldmøtinum kl. 18. Sunnudagin verður innsavnan, og peningurin fer til arbeiði á Haiti og til arbeiði móti Trafficking (menniskjahandli).

Ein bók er nýliga givin út um hennara lív og virksemi á Haiti, og hon hevur nøkur eintøk við sær at selja.